# Føroya Fótbóltsskúli

**Fótbóltssamband Føroya skipar aftur í ár fyri fótbóltsskúlum kring landið**

***Skúlarnir eru fyri børn í aldrinum 8-14 ár***

*Í ár verða skúlarnir tríggir í tali:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24. juni 2005 | kl. 13.00-18.00 | 25. juni 2005 | kl. 10.00-16.00 í Sandavági |
| 24. juni 2005 | kl. 13.00-18.00 | 25. juni 2005 | kl. 10.00-16.00 í Tórshavn |
| 01. juli 2005 | kl. 13.00-18.00 | 02. juli 2005 | kl. 10.00-16.00 á Toftum |

Tá skúlarnir enda, fáa børnini eina T-shirt, sum Føroya Banki hevur latið, eina Sisu-sodavatn, ið Føroya Bjór hevur latið, og góðgæti, ið P/F Kjølbro heilsølan hevur latið. Somuleiðis fáa tey prógv og ein fótbólt.

Tilmeldingarbløð verða løgd út til feløgini, á posthúsini og fólkaskúlarnar kring landið. Tað ræður um at bera skjótt at við tilmeldingini, tí luttakaratalið verður avmarkað. Tilmeldingarfreistin er annars 10. juni 2005

**Fótbóltssamband Føroya**

Sosialurin 341800

# Heimarøktin í Suðurstreymoy

## Heilsurøktarar

**Heimarøktin lýsir eftir heilsurøktarum at starvast í Eldrasambýlinum Oman Hoydalar.**

Talan er um tvey fastlønt størv á 32/40 í blandaðum vaktum. Setanin er frá 1. juli 2005 ella eftir avtalu.

Á Eldrasambýlinum, sum er stovnur undir Heimarøktini, búgva 9 búfólk.

Arbeiðið umfatar hjálp og røkt til búfólkið í samstarvi við heilsuhjálparar og sjúkrarøktarfrøðingar.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt fjølbroytt starv við nógvum avbjóðingum.
Eitt arbeiðspláss har 4 ymiskir fakbólkar samstarva um búfólkið.

**Krøv til tín:**
Útbúgving sum heilsurøktari.
Góð samstarvs- og samskiftisevnir.
Áhuga í at vegleiða og undirvísa starvsfólk og næmingar.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðarin á teleon 317249.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Heilsurøktarafelag Føroya.

Umsókn og prógv skulu stílast og sendast í seinasta lagi 1. juni 2005 til:

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
Anna Maria Oskarsson, økisleiðara
Skáltrøð 14,
FO-100 Tórshavn

Viðmerk á brævbjálvan: Umsókn.

# Søkt verður eftir sølufólki/innkeypara

*Havsbrún er eitt av størstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá uml. 500 mill. kr árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini. Størsti parturin av framleiðsluni fer til útflutnings.*

Vit søkja eftir einum fólki til sølu av fiskafóðuri og at samskipa innkeyp av rávørum v.m. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
- taka lut í søluarbeiðinum av fóðuri
- kundasamskifti
- innkeyp av rávørum til fóðurframleiðsluna
- leggja tilrættis flutning av innkeyptum rávørum og seldum fóðurvørum
- taka lut í fyrisitingarligum uppgávum

**Vit rokna við at tú hevur:**
- eina góða, relevanta útbúgving
- hollan málsligan kunnleika í føroyskum, enskum og skandinaviskum málum
- kunnleika til teldur
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Umsøkjarar við hollari, lívfrøðiligari vitan hava fyrimun. Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 13. juni 2005. Vil tú vita meiri, ert tú vælkomin at ringja til okkum ella senda teldupost.

HAVSBRÚN

**pf Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 414400 · Fax 414401
Mail: ode@havsbrun.fo

# Handilslærlingur

**Til Toystovuna á Tvøroyri**

Søkt verður eftir røskum fyrikomandi lærlingi, ið er áhugaður at arbeiða við klædnamóta.

Ein treyt er, at tú hevur FHS ella HH.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn til okkara innan 1. juni.

**Toystovan**
FO-800 Tvøroyri
att.: Désirée Mortensen Potts

# Til sølu

## BMW 320d DIESEL



Ein sera fínur bilur
Sera væl viðfarin
Árg. 1999
Koyrt 107.000 km

**Útgjald bert**
**kr. 45.000,-**
***Restina práta vit um***

Sosialurin 341800

**Bilfríðkan á Hjalla**
*Tel 35 73 00 ella 21 73 00*
**landsins lagaligasta brúktbilafígging**
**SÍ MEIRA Á WWW.BILFRIDKAN.FO**

Postverk Føroya

# Postboðavloysari m/k

## til posthúsið í Miðvági

Søkt verður eftir einum tímaløntum avloysara m/k at bera post út í Miðvági frá 4. juli til og við 28. juli 2005.

Arbeiðið fevnir um avloysing í postútberingini í sambandi við summarfrítíð, 3 tímar um dagin.

Viðkomandi má vera røkin, álítandi og kundavinarligur.

Nærri um arbeiðið fæst at vita frá posthúsleiðarunum í Miðvági.

Løn eftir sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Skrivlig umsókn við møguligum tilmælum verður seinast 1. juni 2005 at senda til

**Postverk Føroya**
**Avgreiðsla og Søla**
**Óðinshædd 2**
**100 Tórshavn**